# Vegir heldur enn psykiatriskt sjúkrahús



– Tað tók sína tíð at fáa bygt tann fyrsta psykiatriska depilin í Føroyum, sigur Tormóð Stórá, leiðandi yvirlækni á Psykiatriska Deplinum

Alt tað vit vita um, var tað familjan, sum tók sær av teimum sálarsjúku, men har hetta ikki bar til, og har tey vóru harðlig, var ein klivi á Amtshospitalinum, har hesi kundu avbyrgjast. Plássini vóru ov fá og í 1879 varð bygt afturat á Færøernes Amts Hospital, soleiðis at gerast kundu 4 klivar til sinnisjúk. Allarhelst er tað nakað áðrenn hetta, at møguleikin gjørdist at senda føroyingar á donsk sinnisjúkrahús. Plásstrot var eisini har, og tað var trupult hjá føroyingum at fáa pláss á donsku sinnissjúkrahúsunum, og klivarnir á Færøernes Amts Hospital vóru ofta brúktir sum bíðistaður í mánaðir til ár áðrenn pláss varð.

Longi var arbeitt við ætlanunum um at byggja eitt statshospital í Føroyum, men striltið gekk.

Tá flutt var í Dronning Alexandrines Hospital í 1924, vóru bara tvær cellur til sinnisjúk, í mun til fýra á "Gamla hospitali", men var hetta tí at man tá roknaði við at ætlanirnar um at byggja statshospital vóru so langt frammi, at tað fór at koma heilt skjótt.

Í 1929 samtykti eitt samt Løgting, at forhandlast skuldi við statin um at hetta skuldi byggjast. Vit tosa í dag ofta um, at tað ofta er so nógv annað, sum verður raðfest frammanfyri psykiatriina her heima, - men hetta er einki nýtt.

Í 1934 høvdu verið samráðingar um statshospitalið, men í frásøgn verður greitt soleiðis frá:

"Man anser det for meget betydningsfuldt, at der paa Færøerne sættes Vejarbejder i Gang, og da de fornødne Tilskud hertil ikke kan opnaas i Forbindelse med de øvrige i Planen omhandlende Ydelser fra StatensSide, foreslaar man, at Spørgsmålet om Opførelsen af et Sindssygehospital paa Færøerne udgaar af Planen for 5-Aars perioden. – At man af Hensyntil den her paa Øerne herskende altovervejende Interesse for Bygning afVeje (som der hersker stor Mangel af) er gaaet med til at udskyde Spørgsmaalet om Opførelsen af et Sindssygehospital af den Overenskomst, der kom til at gælde for Femaarsperioden fra 1. April 1935, betyder ikke, at man anser opførelsen af Sindssygehospitalet for unødvendigt, nej tværtimod. Man stod imidlertid over for en Tvangssituation, hvor man maatte vælge: Enten Tilskud til Vejbygning eller Opførelsen af et Sindssygehospital, og her Saa Lagtingets Repræsentanter sig med stor Betænkelighed nødsaget til at vælge Tilskud til Vejbygning"

Tilgongdin gjørdist sera drúgv, men 29. oktober 1969 kundu so dyrnar lata upp á Statshospitalinum í Havn.

*Tormóð Stórá, leiðandi yvirlækni á Psykiatriska Deplinum*

lingar, avvarðandi og starvsfólk hugnaðu sær saman. Ofta var rættiliga trupult at siga, hvør var hvør á hesum veitslunum, tí øll vóru so pent ílætin!

### Hvørjum hyggja tit eftir?

At sinnisveikir føroyingar nú vórðu savnaðir undir einum og sama taki, hevði ikki óvæntað stóran áhuga hjá tí vanliga fólkinum. Tað førdi sum vera man bæði til forvitni og tos millum fólk.

Ein søga er um, at tað var ikki óvanligt at fólk fóru sunnudagstúr við bili framvið deildini, fyri líkasum at vita, um til bar at síggja onkran av teimum innløgdu gjøgnum vindeyguni í teirri stóru glasgongini.

Røktarstarvsfólkini hava haraftrat mangan grinið og tikið til, um teir sonevndu livandi urtapottarnar, har fólk stóðu handan gardinur og trappur fyri at lúra eftir teimum, meðan tey og sjúklingarnir gingu túr framvið húsunum.

– Eg veit ikki, men Margreth, hon legði ikki so nógv í hetta. Hon plagdi bara at siga, at fólkini hugdu ikki eftir sjúklingunum, men eftir sjúkrasystrunum!, sigur Marin við einum brosi.

Δ

## Árnasavnið og Øregaard

At teir fyrstu sinnisveiku sjúklingarnir nú vórðu innlagdir á eina deild í Føroyum, var eitt sum fekk mikla umtalu millum manna.

Samstundis sum mong fegnaðust um møguleikan at kunna viðgera okkara egnu sinnisveiku fólk her á landi, vóru tað onnur sum royndu at fáa ein stuttleika burtur tí og spæla sær við orðum og nøvnum í hesum sambandi.

Eitt av teimum meiri genialu nøvnunum á nýggju deildini var Øregaard, meðan onkur nevndi deildina SNS, tað er: Sindsygehospitalet Nykøbing Sjælland. Við Árna Olsen sum yvirlækna treyt heldur ikki við eykanøvnum um alt tað psykiatriska økið. "At fara út til Árna" var eitt teirra. Eitt annað var Árnasavnið, samstundis sum starvsfólkini gingu undir navninum Olsen-bandin.

Hóast fólk søgdu hetta í spølni og neyvan meintu tað so illa, vóru starvsfólkini kortini sera hørm um, at fólk gjørdu gjøldur burtur úr tí arbeiðinum sum tey brendu fyri. Tey royndu hvør í sínum lagi at verja um arbeiðið, gera tað til lítar, soleiðis at fólk skuldu kunna vísa tí virðing.

Tað ringasta var kanska tað, at tað vóru tey sum beinleiðis ivaðust í týdninginum av teirra arbeiði, og nærum ráddu teimum til at gevast her. Tær máttu tí ofta og títt svara spurninginum, um hví tey høvdu valt at starvast júst á eini slíkari deild fyri sinnisveik, - altso um tey ikki hugsaðu um, at tey soleiðis kundu oyðileggja útbúgvingina, ella um tað veruliga var so, at tey arbeiddu millum tey svøku?- Tú kanst ætla, at hetta var sera keðiligt hjá okkum at hoyra. Vit fullu kortini ikki í fátt, men gjørdu arbeiðið samvitskufult og eftir okkara bestu sannføring. Hetta gjørdi eisini sítt til, at vit gleddu okkum at fara til arbeiðis hvønn einasta dag.

Tað var eisini til miklan íblástur, at tær sóu at viðgerðin gav úrslit: At fólk komu inn við einumhvørjum sinnisligum veikleika og vórðu útskrivað eina tíð seinni. Tann fyrsti sjúklingurin varð longu útskrivaður eina viku eftir at deildin lat upp!

Nógv eru tey, sum bert komu eina einstaka ferð ella fáar ferðir til viðgerðar og gjørdust frísk, men lítið varð tosað um tað. Í dag er meiri vanligt, at fólk stíga fram og tosa um sínar trupulleikar.

- Og tað er bara gott, tí øll kunnu verða rakt av tunglyndi ella øðrum sálarligum brekum, um trýstið verður nóg stórt.